# Føroysk møtir í Århus – 10 ára hátíðarhald

*Myndir og lagt til rættis: Dávur Winther*



Leygarkvøldið 24. oktober var føroyskt møti hildið í missiónshúsinum Ebenezer í Brammersgade 4 í Århus. Umleið 30 føroyingar vóru savnaðir hetta kvøldið, sum so eisini var 10 ára hátíðarhaldan fyri hesum arbeiðið millum føroyingar í Århus og har um vegir.

Ikki er tað fyrstu ferð, at føroyskt andaligt arbeiðið hevur verið í Århus millum útisetar har á leið – Men á heysti 1999 bleiv aftur roynt at fáa meira skipað andaligt arbeiðið. Heri Elttør bleiv settur av Indre Missión sum trúboðari við serligum atliti til føroyingar, ið búleikaðust í Danmark, og hann var fyrstur aftur til at royna at samla føroyingar í Århus til Guðs orð á móðurmálinum.

Okkurt møti var hildið í Áarstovu, men skjótt varð avgerð tikin um at royna í Carmel missiónshúsinum, og nøkur ungfólk fingu áheitan um at hjálpa við í arbeiðinum.

Fyrsta »nevndin« var samansett av Jónhild Abrahamsen, Elsu Lervik og Símun Jacobsen.

Møtini komu skjótt í eina fasta legu, soleiðis at eitt møti varð hildið um mánaðin, og nøkur vóru trúføst til at koma, til byrjan bert 5-10, sum fingu ein serligan felagsskap við hvønn annan.

Síðan tá hava savnast millum 15-35 fólk, alt eftir hvør flytur heim, og um onnur eru komin til Århus. Og nú hetta 10-ára hátíðarhaldið var, savnaðust smá 30 fólk.

Altíð hevur verið roynt at fáa føroyingar inn í danskt meinigheitslív, og tí er tað føroyska »bert supplement« til andaliga lívið, sum trúboðarin Heri Elttør málber seg.

»Skiftandi tíðir og skiftandi fólk«, soleiðis er arbeiðið enn. Í dag sita í nevndini ella arbeiðsbólkinum Ragnar Petersen, formaður Janus Trúgvason og Mariann Durhuus og møtistaðið er flutt til Brammersgade 4, ið er missiónshúsið Ebenezer. Vanliga er møti hvørt tryðja leygarkvøld í mánaðinum. Eisini eru hugnakvøld við ymiskum innihaldið inn ímillum, bæði í privatum heimum, útferðir og tiltøk. Eisini verður fyriskipað annað í Ebenezer (sí www. utisetin.dk – Århus).

Arbeiðið hevur sítt tilknýti til landsnevnd undir Heimamissiónini, men samansetningurin av fólkum til møtini er tvørkirkjuligur - fólk úr ymiskum meiniheitum, og fólk, ið ikki hava ávíst knýti til meinigheit. Øll eru vælkomin at hoyra Guðs orð, syngja saman og at njóta góðan kristnan felagsskap og altíð við kaffi og ein góður kakubiti omaná.



## Navnabroyting:

Arbeiðið hevur gingið undir navninum KFÅ (kristnir føroyingar í Århus)

Oftá hevur verið borið uppá mál at fáa okkurt meira hóskandi navn fyri arbeiðið. Í seinastuni hevur miðvíst verði gjørt nakað við hetta og bleiv nýggja navnið avdúkað á møtinum síðsta leygarkvøldið.

Navnið verður framyvir Áarløkurin – sum er tikið útfrá Jóh 7,37 – 38 »Er nakar tystur, tá komi hann til mín og drekki! Tann, sum trýr á meg, úr lívi hansara skulu, soleiðis sum skriftin hevur sagt, renna løkir við livandi vatni.«

”Ynski og bøn okkara er at føroyingar kunnu koma saman um Guðs orð og at Áarløkurin má kennast sum eitt stað har trúgvin kann vekjast, mennast og verveitast.

Somuleiðis lyggur orðið Àarløkurin væl í samljóð við Àarstovu og átti tí at verið lætt hjá útisetafólkið á Århusleiðini at minst til at ymisk tiltøk eru fyri føroyingar í Århus” - sigur arbeiðsbóklurin - Ragnar Petersen, formaður Janus Trúgvason og Mariann Durhuus.

Á heimasíðuni www. utisetin.dk kann ein finna upplýsningar um ymisk tiltøk/møtir o.a. Har fært tú eisini meira at vita um kontaktir, møtiskrá o.a. hjá Áarløkinum í Århus.

